Sangur, matur, undirhald o.m.a. Øll eru hjartaliga vælkomin.

YNSKIST
Radiatorur, uml. 1 m. langur, ynskist til keyps.
Tlf. 373843

APEX-FER‹ASE‹IL
Vágar-Kastrup og heimaftur til sølu fyri 2.000 kr. Kann brúkast nær tit vilja.
Tlf. 448094

GLØS YNSKJAST
Brúkt Holmegaard "skipsgløs" ynskjast til keyps.
Tlf. 320399

SØLUSTEVNAN
á Giljanesi 25.-26. nov. Atgongumerkini, sum eisini vóru lutase›il, vóru drigin: 1) Fartelefon frá Formula FO 26026 Grønur se›il 2) Dunna 37066 Rey›ur se›il 3) Karamellueskja 37017 Rey›ur se›il 4) Ein kassi av sodavatni 24991 Gulur se›il. Tey i› hava vunni›, ver›a bi›in um at venda sær til telefon 332064 innan 1.1.2001, ella fellur vinningurin aftur til felagi›.
Mi›vágs Ró›rarfelag

SU‹RINGAR!
Jólahugvi hjá Flogbóltinum ver›ur sunnudagin 10. des. kl. 15.00. Skrá: Hornorkestri› spælir jólatónleik, Barnakóri› úr Hvalba syngur. 4.-5. flokkur vísir fram jólaspøl. Gentur spæla blokkfloytu. Nissuvættrar spæla vi› børnini. Burturluting av nissupørum og køkuhúsi. Køkutombola. Nissan vitjar vi› pakkum til børnini. Vi› flogbóltskvø›u,
T.B.

FLOGFER‹ASE‹IL
Flogfer›ase›il til Kbh. 11.12.00 vi› Maersk til sølu fyri 1.000,- kr. Og ein flogfer›ase›il til barn 11.12.00 vi› Maersk til sølu fyri 500,- kr.
Tlf. 223454

STÓLAUNDIRLAG
150x120, verjir gólv ella gólvteppi, bíliga til sølu.
Tlf. 312273

VIT SUM FÓRU Í 1. FLOKK Í
Meiningin er at hava eina veitslu summari› 2001. Áhuga› skrivi› til Árg. 66, Postboks 221, 700 Klaksvík

VENJARI
Vi› hesum ver›ur søkt eftir venjara til Bóltfelagi› Royn í Hvalba næsta kappingarár. Nærri uppl‡singar fáast vi› at venda sær til formannin, Martin í Nesi, tlf.: 37 51 84 ella 22 26 95. Umsóknir skulu vera komnar í seinasta lagi 20. desember.
Bóltfelagi› Royn Hvalba

TIL SØLU
Ein Ericsson GA 628 GSM fartelefon, 1 1/2 ára gomul, v/ladara, tasku og bók, til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 252388

NOKIA 3210
til sølu vi› vanligum og biluppladara fyri 1.000 kr.
Tlf. 221303

54 ORIGINALIR FILMAR
til sølu fyri hægst bjó›andi.
Tlf. 422326/212330

YNSKIST
Eitt Tandberg huldra 10 ynskist til keyps, um ikki anna› so til reservadeilir. Sig mær frá, um tit hava eitt.
Tlf. 319613

BARNATÍMIN
Um nakar hevur tiki› sendingina Barnatímin (børn ringja inn), sum var› send leygardagin 18. nov., so eri eg áhuga›ur at kopiera sendingina.
Tlf. 423364

Eivør Pálsdóttir vi› n‡ggjari fløgu

Eivør Pállsdøttir hevur saman vi› sínum tónleikavinum úr Ivory innspælt fløgu ni›ri í Danmark. Eftir eitt líti› hugnaligt prát vi› Eivør Pállsdóttir og Mikael Blak, hevur man hesumegin tastaturin fingi› eitt líti› innlit í hesa komandi útgávuna. Talan er um eina solo-útgávu vi› Eivør Pállsdøttir og ikki Ivory. Denturin, á fløguni er lagdur á vokal ella sang, har tekstur hevur meir at siga fyir sjálvt lagi›. Og ikki sum Ivory, har improvisatión er ein stórur partur av heildini, og røddin ver›ur brúkt sum eitt instrument. Í sept. næsta ár er ætlanin, at Ivory skal í studio yviri í USA; Jack DeJanet, ein kendur jazztónleikari, ver›ur framlei›ari.

Gestatónleikarar á hesi komandi fløguni eru Tróndur Bogason, ljómbor›; Kim Enk Zorde, guitaristur úr Danmark. Eisini hava limir úr Fótatra›k, kvø›i› vi› í einum lagi og Hans Jacob á Brúnni kvø›ur og syngur eisini vi›. Húsan til fløguna hava Niels Galan og Uni Árting gjørt.

Peningaligi høvu›sstu›ulin í sambandi vi› hesa útgávuna er Kaupthing. A›rir, i› hava stu›la› eru; FJM, Fjølrit, Gøtu Kommuna, Gramex úr Danmark, Mentunnargrunnurin, Shell, Smyril Line.

Sum so nógv onnur hevur Eivør nokk altí› havt eitt ella anna› vi› sang og tónleik at gera. Men fá hava eina so gó›a og vakra sangrødd. Hon hevur sungi› nógv; fólka -og vísusang, í kirkjukóri›, pop/rokk, fólka/jazztónleik, og hevur hon eisini gjørt egin løg, harav nøkur er vi› á hesi komandi útgávuni. Serliga ta› sí›sta ári› vi› Ivory hevur veri› hendingaríkt. Tilfari› á tí komandi fløguni er í høvu›sheitum úr hesum tí›arskei›num. Annars er fløgan ein endurspegling av tí tónleikaligu fer›ini Eivør hevur veri› ígjøgnum. Sangirnir eru natúrliga valdir.

Ivory hevur spælt saman í bara eitt ár. Í byrjanini spældu tey standard jazz, men í tí sí›sta hálvárinum er tónleikurin nógv broyttur og vor›in nógvar fer›ir meiri spennandi. John Purcell, heimskendur tónleikari úr USA, hevur nokk í hesum førinum veri› ein alstór hjálp vi› veglei›ing og íblástri. Eftir at hava hoyrt Ivory, kom hann á vitjan í Føroyum vi› tí fyri eyga at hjálpa bólkinum frammá. Og ta› hevur hann eisini gjørt. Eftir hansara vitjan var t‡›uligur munur at síggja. Hesi ungu fólkini blivu nógv djarvari og livdu seg meir inn í tónleikinum; fingu nokk eitt sindur av sjálvsáliti› afturat. Og ta› er bara veldugt.

Limirnir í bólkinum hava lært eina rúgvu, me›an tey hava veri› í studio. Mest sum allur tónleikurin er innspældur “live”, ella beinlei›is. Hetta krevur sjálvsagt meir av samanspælinum í bólkinum og ta› gevur eisini sjálvum tónleikinum naka› serligt. Hvønn dag í eina viku hava tey veri› í sama rúmi› og hava, í grundini, gjørt ta› sama; innspælt tónleik. Og ofta var› ta› midnátt, á›renn dagurin í studiounum var› li›ugur.

Annars vil bólkurin senda ein serliga tøkk til Focus Recording vi› Hans Nielsen. Ta› var so, at beint á›renn tey skuldu fara í studio fyri fyrstu fer›, var› Mikael Blak so óheppin at skera seg í fingurin av einum Victorinox-knívi. So hann kundi ikki spæla í eina heila viku. Hans Nielsen fekk sí›an tillaga› tímarnar í studionum til ta næstu vikuna, so tey sluppu frammat.

Tilfari› spennir seg vítt. Frá vanligum vøkrum fólkasangum til kvæ›i og Kingo. Tey flestu løgini eru heimagjørd, har yrkingar av kendum føroyskum rithøvundum, ver›a brúktar. Sangirnir eru natúrliga valdir og eru allir á føroyskum; burtursæ› frá tí eina sanginum, ein Kingo Sálmur, sum Hans Jacob á Brúnni úr Fuglafir›i syngur. Hann kvø›ur eisini í kvæ›num “Í Gøtu ein dag”. Vi› er eisini ein útseting av sanginum “Áh, kundi á tí›arhavi” hjá Hanus Johansen . Tann eina tekstin hevur mó›ir Eivør, Sædis Eilifsdóttir skriva›. Hetta hevur t‡tt sera nógv fyri ta ungu songkvinnuna. Eivør fór úr 9. flokki at spæla tónleik og hevur fingi› stu›ul heimanífrá til tess. Hetta hevur havt alstóran t‡dning, sigur Eivør.

Hendan útgávan ver›ur uttan iva eitt spennandi íkast til føroyskan tónleik.

Eivør Pálsdóttir hevur júst veri› í studio í Danmark, har hon hevur innspælt n‡ggja fløgu

Mynd: Jonhard

Sí›ani hon fór úr 9. flokki, hevur Eivør at kalla bert fingist vi› tónleik

Mynd: Jonhard

HEILSANIR

Gó›i Atli
Hjartaliga tillukku vi› 30 ára fø›ingardegnum. Takk fyri nógvar gó›ar túrar saman.
Heilsan Katrin og Fredrik úr Bhutan



Gó›i Atli
Tillukku á 30 ára fø›ingardegnum. Vit eru so gla› fyri at hava ein stóran beiggja.
Heilsan Ey›bjørg og Ey›un

Eg og foreldur míni vilja á hendan hátt hjartaliga takka øllum, sum gleddu meg á konfirmatiónsdegnum tann 16.04.2000. Vit ynskja øllum eini gle›ilig jól.
Maud Egholm, Vestmanna

Gó›u Maria og Martin!
Hjartaliga tillukku á tykkara hátí›ardegi í dag.
Ynskja skyldfólk

Gó›i Einar abbon
vi› Rasmus Effersøe. Hjartaliga tillukku vi› 54 ára degnum. Takk fyri keitúrarnar eg sleppi vi› tær.
Kærastu heilsanir abbasonur tín Einar

Gó›a søta Svanna
Tillukku vi› 3 ára degnum. Vit gle›a okkum at síggja tykkum aftur.
Omman og abbin í Vági

Gó›a mamma
Tillukku vi› teimum 60 ungu árunum.
Heilsan vit í Havn



Gó›a elska›a Lív
Hjartaliga tillukku vi› 12 ára degnum. Jesus signi framtí› tína.
Heilsan frá ommu og abba í Froba

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 fer›ir um vikuna

Gevi› gætur

Bert heilsanir, skriva›ar á henda lepan og goldnar frammanundan vi› 30,- kr. fáa innivist í bla›num. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgrei›sluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mi›degi 2 dagar fyri útkomudag. Vi›merki› annars ni›anfyri, um heilsanin ynskist í bla›i› ávísan dag.
❑ T‡sd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..
....
....
....
....
....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústa› aftanfyri á myndina og at leggja vi› ein frankera›an brævbjálva vi› navni og bústa›i.

Um ney›ugt fyri arbei›sgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í bla›i› annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ....
Bústa›ur: ....
Bygd/b‡ur: .... Tlf.: ....

Sendi› lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merki› bjálvan: **»Heilsanir«**